# Hesi skulu leiða okkum gjøgnum kreppuna

**Evnið á ársins leiðaradegi fríggjadagin var: Heimurin í kreppu – hvussu koma vit styrkt út hinumegin? Omanfyri 200 leiðarar luttóku**

ÁRSINS LEIÐARADAGUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Gissur Patursson & Jens Kristian Vang*

Kreppan, sum longu nú leikar í uttan um okkum, var eisini evnið til fleiri av framløgunum á leiðaradegnum. Spurt varð, hvussu vit fyrireika okkum til kreppuna, og hvussu møta henni, tá hon rakar. Ongin ivi var um, at hon rakar eisini okkum. Støðan í Føroyum varð fleiri ferðir samanborin við eina tsunami, sum longu hevur rakt aðrastaðni, men sum ikki er komin heilt norður á klettarnar her. At so onkur ikki vildi brúka orðið kreppa, men heldur rópti hana "avbjóðingar", er í somáta líkamikið.

Omanfyri 200 fólk luttóku á leiðaradegnum, sum hevði eina fjølbroytta og áhugaverda skrá, við framløgum, filmum, kjaki, workshops, atkvøðugreiðslu, góðum mati, networking, ársins leiðara og afterparty í Miðlahúsinum.





*Leiðarar koma ofta í tvístøður, sum kunnu fáa stórar avleiðingar. Eitt nú í sambandi við uppsagnir, ella hvussu til ber at motivera starvsfólkini í minni góðum tíðum. Ársins leiðarar seinastu fýra árini, Magni Arge, Andras Róin, Marner Jacobsen og Christian Nagata verða settir í ávísar tvístøður, sum fólkini í salinum eisini skulu taka støðu til og atkvøða um. Her verða besti argumentini luftað.*



***Nógv høvdu glett seg at hoyra donsku Stine Bosse, stjóra í TrygVesta. Hon greiddi frá, hvussu til ber at stýra einari fyritøku, í hennara føri eitt tryggingarfelag, ígjøgnum eina kreppu. Her var høvuðsboðskapurin, at ein sum hevur stýrt við skili áðrenn kreppuna, kemur styrktur út hinumegin. Tí kann kreppa eisini vera menning.***
***Tá ið hon tók við leiðsluni á TrygVesta í 2002 hevði tryggingarfelagið stórt undirskot. Við ógvusligum tiltøkum eydnaðist tað at venda gongdini, so felagið í dag er millum tey størstu í norðurlondum. Hon hevði sett sær fimm ár til tillagingarnar, tí slíkt krevur tíð.***
***Øll økið vórðu optimerað; summar tænastur vórðu seldar frá, deildir vórðu niðurlagdar og sparingar fóru fram á øllum økjum. Aftan á trý ár bar til at hugsa frameftir, og at brúka orkuna til at finna upp á nýggjar vørur og tænastur. Í hesum sambandi nevndi hon førleikamenning av starvsfólkunum, har tey brúka sera stórar upphæddir – eisini nú tíðirnar versna. Nú verður fyritøkan brandað sum ein tryggleikaveitari, í staðin fyri bara at selja turrar tryggingar, har meginparturin er skrivaður við smáum.***



*Fimm fyndug fólk verða spurd, hvussu vit koma styrkt út úr kreppuni. Hermann Oskarsson, Janus Petersen, Søren Bruun, Sonja Jógvansdóttir og Jóannes Eidesgaard. Søren Bruun, stjóri í Suðuroyar Sparikassa helt, at kreppan eigur at geva høvi til at rætta teir skeivleikar, sum eru. Bæði í fyritøkum og politiskt. Eitt nú eftirlýsti hann reformar, bæði sosialar og innan skattaskipanina. Sonja Jógvansdóttir, samskipari í Samtak, langaði út eftir samgonguni og Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra, sum, eftir hennara tykki, lat alt valdið upp í hendurnar á fíggjarnevndini og Annfinn Kalsberg undir fíggjarlógarviðgerðini. Hon eftirlýsti støðufesti og at fólkið og vinnan kunnu kenna seg trygg við politisku avgerðirnar, sum verða tiknar.*
*Og fjøldin brast útúr, tá Sonja Jógvansdóttir segði seg undrast um, at samgongan játtar pening til ein tunnil norður um fjall, í staðin fyri at bøta um sambandið til Hvalbiar, har nógv vinnuvirksemi er.*
*– Tað eg veit av, eru bara tvey stór ting í Viðareiði: eitt hotel og so Anfinn Kalsberg, endaði hon.*